## TVINGSILSSØLA

**Týsdagin tann 25. november 2008, kl. 10:00** verður á Dómaraskrivstovuni, undir Glasheyggi 14, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir fiskiskipið PHOENIX OW 2362, BRT 699 og NRT 213.

Skipið er bygt í 1985 á Skála Skipasmiðju, Skála og er skrásett sum heimahoyrandi á Tvøroyri. Eigari av skipinum er P/F Phoenix Reiðaravirkið.

Fyrireikandi tvingilsfundur er ásettur at fara fram á Dómaraskrivstovuni, undir Glasheyggi 14, 100 Tórshavn **hósdagin, tann 6. november 2008, kl. 13.00**, og er tann, ið metir seg hava veð ella onnur rættindi í skipinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufund.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højsted, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260** (sak nr. 3870802), sum kann geva nærri upplýsingar um skipi og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja skipi.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Dómaraskrivstovuna tlf. 311003 (sak nr. AS 2-32/2008)

**Føroya Fútarættur**

**www.sosialurin.fo**






## STARV
## sum havnastjóri/havnameistari við Fuglafjarðar havn

Starvið sum havnastjóri/havnameistari við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leyst at seta tann 01. desember 2008 ella so skjótt sum til ber eftir hetta.

**Starvið:**
Tú kemur at hava dagligu leiðsluna av Fuglafjarðar havn, somuleiðis sum tú eisini í starvinum kemur at átaka tær uppgávur við at marknaðarføra havnina saman við býráðsleiðsluni í tøttum samstarvi við havnanevndina og býráð.

**Førleikakrøv:**
Viðkomandi útbúgving, førleika í enskum máli bæði í talu og skrift, somuleiðis sum tú skalt duga at orða teg væl bæði munnliga og skrivliga, hava teldukunnleika og kunnleika til nýmótans leiðslamboð.
Haraftrat skal tú eisini hava hollar leiðsluførleikar frá almennari ella privatari vinnu, og ávísar royndir innan sjóvinnu.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fært møguleika fyri at menna havnina.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag, somuleiðis verður skrivligur sáttmáli gjørdur partanna millum um arbeiðstreytir vm.

**Starvstreytir:**
Umsøkjarar við viðkomandi royndum hava fyrimun.

Royndartíðin verður sambært avvarðandi sáttmála.

**Hevur tú áhuga**
so ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin **03. november 2008 kl. 15.00.**

**Fleiri upplýsningar**
fáast við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 737777 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 09. oktober 2008*

**Fuglafjarðar býráð**

## Handilshøli í Tórshavn til leigu

Hølið har, sum kiosk Svalin Varðagøta 65 er, er nú til leigu.

Hølið er væl egna til ymisk endamál.

**Áhugaði kunnu ringja 59 46 30**

Starvslýsing

Barnatænastan

## Heilsufrøðingar

Í Barnatænastuni eru 2 størv leys at søkja:

1) Eitt fulltíðarstarv, sum í løtuni umfatar Streymoy/Vágar
Starvið verður at seta skjótast tilber.

2) Eitt avloysarastarv hálva tíð, sum í løtuni umfatar Streymoy/Vágar
Starvið verður at seta skjótast tilber og fyribils fram til 1. september 2009.

Arbeiðið er samansett virksemi, við tænastu til barnafamiljur og skúlar í økjunum. Stórur dentur verður lagdur á tvørfakligt samstarv.

**Vit kunnu bjóða**
Sjálvstøðugt og spennandi arbeiði, og til tíðir krevjandi.
Fakliga menning og supervisión.
At vera partur av einum samstarvstoymi við positivum og engageraðum starvsfeløgum.
Væntast kunnu broytingar í mun til raðfestingar og mannagongdir í samband við menningarverkætlan.

**Førleikakrøv**
Útbúgving sum heilsufrøðingur.
Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir frá heilsufremjandi arbeiði á barna- og familjuøkinum.

Áhugi fyri fakligari menning. Arbeiðið er skipað í samstarvstoymir, og er tað tí ein fyritreyt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevnir og kann viðvirka til at menna toymið.

**Lønar- og setanartreytir**
Løn sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið er Barnatænastan og tænastustaðurin í løtuni er Streymoy/Vágar.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Barnatænastuna tel. 360000.

**Umsókn**
Umsókn skal sendast til:

Nærverkið
Barnatænastan
Bókbindaragøta 8,
Postboks 132
FO-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 30. oktober 2008.

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

# Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 11. september 2008 hevur samtykt broyting í byggisamtyktini fyri Kollafjørð.

Ætlaða broytingin er at regulera A1-øki við Oyrareingir, millum Ryggsá og Trýggjaráir, sambært verandi bygging á staðnum.

Broytingin fevnir um partar av matr. nr. 272, 273 og 274 við Oyrareingir.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum frá 13. oktober til og við 3. november 2008, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða send Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 13. januar 2009.

**Tórshavnar kommuna**